

## Hálv øld við føroyskum hittum

Í hálva øld hava Tey av Kamarinum givið tónleik út á føroyskum. Tey skrivaðu nøkur av fyrstu hittunum á føroyskum, og tey spæla framvegis. Nicolina Jacobsen og Eyðbjørn Jacobsen fara at spæla live í sendingini, og prátað verður við tey um mongu árini í tónleiki. Eisini verður spurt, um tey hava fingið tað viðurkenning frá fínu mentanini, sum tey kanska hava uppiborið.



## Kringvarpsstjóri í andgletti

Annika Mittún Jacobsen hevur rættiliga verið í andglettinum sum kringvarpsstjóri. Sparingar, uppsagnir, morgunlestur og public service skyldir hava verið ovast á breddanum. Hvussu er tað at verða stjóri á einum so almennum arbeiðsplássi, sum flestu føroyingar hava eina meining um? Og hvussu er at taka truplar og tungar avgerðir, siga fólki úr starvi, verða fyri hørðum ágangi og standa við avgerðir? Tað práta vit við Anniku Mittún Jacobsen um.



## Kendir føroyingar til X Factor upptøkuroynd

Hoyr hvat hendir, tá ið kendir føroyingar sum Alfred Olsen, Torbjørn Jacobsen og aðrir fara til upptøkuroynd til X Factor, har Thomas Blachman sigur sína hugsa um avrikini hjá føroyingunum. Skemtið hesaferð



## Rørsmiðurin og akademikarin

Løgtingsfólk hava sera ymiskar útbúgvingar. Summi hava lisið í nógv ár uttanlands og eru komin við akademiskum førleikum í skjáttuni. Onnur løgtingsfólk hava bara fólkaskúla og arbeiðsroyndir at dúva uppá. Er tað ein fyrimunur at hava lisið nógvar bøkur, ella er tað líka frætt, at hava verið til skips ella lagt rør. Akademikarin Sjúrður Skaale og rørsmiðurin Gerhard Lognberg fara at kjakast um politikk og útbúgving.



## Kika eftir stjørnum

Vit kika eftir stjørnum á Norðasta Horni í sambandi við heimsumfatandi tiltakið Earth Hour. Millum klokkan 20.30 og 21.30 verður ljósið sløkt í býum í meira enn 80 londum kring heimin. Eisini Havnin er við í titakinum. Reportari hjá Hvonn Live setir kikaran fyri eygað á Norðasta Horni.

